## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Frá blonkum arki til eitt dreymaplagg

**– Fólk tíma ikki at møta øðrum fólkum, sum ganga í sama plaggi sum tey. Sum skraddarar kunnu vit útvega fólki eitt plagg, sum er unikt, siga tveir av góðu skraddarum okkara, Sólvør og Beinta**



*Beinta Vilhelmsen og Sólvør Jacobsen hava arbeitt saman í tvey ár sum skraddarar. Nú eru tær á søluframsýning í »Listir«*

*Mynd: Bárður*

HANDVERK
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** – Skræddari stavast altso við A – skraddari!

Teir báðir skraddararnir, Sólvør og Beinta eru sera bevístar um sítt fak. Og tað kemur eisini til sjóndar í øllum tí, tær takast við.

Teirra arbeiði er merkt av nærlagni, dygd og eini uppfinnsomheit sum ein má leita leingi eftir.

Tær halda vanliga til í hølum sínum miðskeiðis í Havnini, men tað hevur helst ikki altíð verið so lætt hjá fólki at finna fram til, hvar tær halda til.

Tí mong munnu tey vera, sum ynskja at síggja alt tað, sum tær fáa frá hondum.

Nú er hesin møguleikin so til staðar, við teirri søluframsýningini tær hava í hølunum hjá Listir í Bøgøtu. Á hesum staði ber væl til at síggja og keypa nøkur av teim snotuligu pløggunum, sum tær hava evnað til.

### Kærkomið høvi

Sólvør Jacobsen (26) og Beinta Vilhelmsen (29) seyma so at siga alt tað, sum fólk ynskja.

Her kann vera talan um buksur, blusur, taskur, turriklæð bæði til børn og vaksin, eins og vanlig gerandisklæði.

Í lítlu hølunum, har tær halda til, er ikki gjørligt at hava ein sýnisglugga. Tað eru uttan iva mong, sum hava ynskt at sæð tað tær takast við, men sum hava hildið seg aftur í at støkka inn á gólvið hjá teimum, orsakað av hølisviðurskiftunum.

– Nú vit eru komnar oman higar, so ynskja vit at markera okkum og okkara arbeiði, siga tær báðar við Sosialin.

Henda framsýningin í Listir er tí somuleiðis eitt kærkomið høvi hjá teimum at vísa fram nakað av tí, tær hava gjørt. Og ein góður møguleiki hjá fólki at ogna sær lutir, sum eru »made in the Faroes«.

Tær eru tí sera spentar uppá, hvussu henda søluframsýningin fer at eydnast væl. Tær byrjaðu seinasta mánadag, og verður opið allan henda mánaðin.

### Dreymaplaggið

Tær báðar byrjaði at arbeiða saman fyri sløkum tveimum árum síðani.

Hetta var ein heppin loysn, tí tær hava havt úr at gera síðani tá. Nógv pløgg eru latin úr hondum, og hetta er so við til at skapa enn størri umtalu manna millum.

At arbeiða sum skraddari er eitt heilársstarv, men tað eru tó tíðir, tá serliga nógv er at gera – t.d. henda tíðina, nú fólk ynskja sær føroysk klæðir til studentsprógvið ella til ólavsøkuna, sum verður um minni enn fýra mánaðir.

Teirra styrki er, at tær kunnu seyma eitt dreymaplagg til fólk, hóast fólkini ikki hava nakra mynd ella annað at vísa fram. Byrjast kann við einum blonkum arki og kann tað enda við júst tí plagginum, sum fólk altíð hava ynskt sær.

– Á henda hátt kunnu fólk eisini tryggja sær, at teirra plagg er unikt – at eingin annar gongur í sama plaggi sum tey, siga tær báðar.

### Hjá fólki

Sólvør og Beinta sita tó ikki bert í egnum hølum og seyma klæði. Og tær eru ikki bert á almennum framsýningum. Tær vitja eisini ofta úti hjá fólki.

Eitt, sum teimum dáma sera væl – og sum onnur eisini halda vera áhugavert – eru tey sonevndu »home-parties«.

Hesi kvøldini hava verið sera væl umtókt, og hava tær longu verið fleiri ferðir úti, m.a. til samkomur í Vestmanna, Havn, Porkeri og í Vági.

Á hesum samkomum hava tær so víst fram nakað av tí, tær hava gjørt, eins og tær hava kunna tikið mát av fólki, soleiðis at fólk kunnu fáa júst tað plaggið, tey ynskja sær.

Jú, her er talan um tvær kvinnur sum vilja nakað. Og um eina serføroyska framleiðslu, sum fólkum dáma.

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu , tá mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Maja K. Lervig**
Leirvík

andaðist og varð jarðað.

Takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Takk til tykkum á Giljagarði, sum vóru so væl um hana, ta tíð hon var har.
Takk fyri minnisgávur til Missiónshúsið.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Óluva, Sylverius og Mikkjal**

---

†

Kunnað verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri

**Jørgen Kreisb**

andaðist í heiminum 2. mai, 50 ára gamal.

Farið verður frá heiminum á Falster Aastrupvej 50, 4850 Stubbekøbing, 14. mai kl. 12.00.

Verður jarðaður á Assistens Kirkegaard í Keypmannahavn kl. 13.45.

*Familjunnar vegna*
**Natascha**

---

## Tøkk

Eg vil við hesum fegin bera fram eina tøkk til øll, sum á einhvønn hátt góvu mær ans á 75 ára føðingardegnum 30. apríl 2005.

Tøkk fyri vitjanir og gávur, fyri uppringingar og fjarrit, fyri brøv og kort og heilsanir annars.

Tøkk til tykkara, sum á ein serligan hátt gjørdu dagin hugnaligan og minnisríkan.

Harrin signi oss og ráði.

**Bestu heilsan**
**Sigvald Kristiansen**

---

### Rætting – skeivt navn

Leygardagin høvdu vit myndir frá eini móttøku, sum varð hildin í sambandi við at Skipafelagið Føroyar og Eimskip eru løgd saman í eitt felag.

Av misgáum var navnið á stjóranum komið skeivt fyri. Navnið skal sjálvsagt vera Árni Joensen.

Vit biðja orsakað mistakið!